Beinir Johannesen **nr. 1/2020**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a
Fyrispurningur um kringvarpsgjald, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu nógvir landsstovnar, sjálvsognarstovnar, interkommunalir felagsskapir, kommunalir stovnar og vinnufeløg rindaðu kringvarpsgjald fyri 2019?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um broytingar í gjaldinum hjá hesum?

Viðmerkingar:

Í 2015 vórðu broytingar gjørdar í kringvarpslógini, og skuldu allir teir omanfyrinevndu stovnar og feløg nú gjalda kringvarpsgjald. Fyrispurningurin er settur fyri at fáa greiðu á, hvussu nógvir teir eru í tali, ið gjalda kringvarpsgjald, og um landsstýrismaðurin hevur ætlanir um broytingar viðvíkjandi tí.

Á Løgtingi, 7. august 2020

Beinir Johannesen